FYLGISKJAL 7

jn.fo

Hoyringssvar til uppskot til nýggja miðlastuðulslóg

Nú hava føroysku miðlarnir kunna fingið miðlastuðul síðani 2017. Miðlastuðulin hevur eisini verið broyttur í tíðarskeiðinum. Síðani 2017 eru 12,9 mió. kr. útgoldnar í miðlastuðli/rakstrarstuðli til 10 miðlar. Umframt tað er eisini verkætlarnarstuðul útgoldin til fleiri miðlar.

Miðlastuðul / rakstrarstuðul síðani 2017 til í dag

	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024	2025	Tilsamans
Sosialurin	824.365 kr	768.462 kr	691.727 kr	678.103 kr	606.478 kr	225.795 kr	240.000 kr	348.000 kr	315.307 kr	4.698.237 kr
Dimmalætting	294.902 kr	230.499 kr	281.348 kr	276.958 kr	349.370 kr	110.727 kr	- kr	- kr	98.727 kr	1.642.531 kr
Norðlýsið	193.854 kr	195.625 kr	192.873 kr	231.843 kr	269.107 kr	62.065 kr	63.665 kr	- kr	39.061 kr	1.248.093 kr
Portal.fo	192.898 kr	190.338 kr	213.751 kr	237.741 kr	365.616 kr	118.692 kr	190.691 kr	234.869 kr	206.161 kr	1.950.757 kr
FM1	186.168 kr	199.263 kr	195.184 kr	207.911 kr	226.941 kr	53.291 kr	98.727 kr	163.525 kr	139.007 kr	1.470.017 kr
VP.fo	152.514 kr	172.565 kr	159.560 kr	175.373 kr	182.941 kr	22.570 kr	- kr	62.603 kr	43.407 kr	971.533 kr
R7	136.138 kr	195.025 kr	185.589 kr	192.068 kr	- kr	- kr	- kr	- kr	- kr	708.820 kr
JN.fo	19.160 kr	48.220 kr	79.964 kr	- kr	- kr	6.858 kr	6.914 kr	6.158 kr	8.100 kr	175.374 kr
Eyp.fp								32.067 kr	20.229 kr	52.296 kr
Rás 2								22.776 kr	- kr	22.776 kr
	1.999.999 kr	1.999.997 kr	1.999.996 kr	1.999.997 kr	2.000.453 kr	599.998 kr	599.997 kr	869.998 kr	869.999 kr	12.940.434 kr

Rakstrarstuðul: Vit halda at allur miðlastuðulin skal útgjaldast sum rakstrarstuðul.

Vit halda eisini at býti til rakstrarstuðulin eigur at býtast øðvísi enn hvat lagt er upp til. Vit halda lógin eigur at broytast til: "Stuðulin verður latin sum ein føst grundupphædd, áljóðandi 40 prosent av árligu játtanini av rakstrarstuðlinum, býtt javnt millum umsøkjararnar, sum lúka treytirnar, og harumframt verða 60 prosent av árligu játtanini latin sum ein lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli." Hetta er sami leystur sum var frá 2017.

Vit halda eisini §4 stk 2, skal strikast og §4 stk 3,4 og 5 verða broytt til §4 stk 2,3 og 4.

§4 stk 2 gevur fleiri ivamál, og kann hava trupuleikar fyri ein miðil sum okkara.

JN.fo bleiv sett á stovn í 2013, og hava vit síðani tá vent okkum til ein breiðan skara av brúkarum. Vit fingu miðlastuðul í 2017, 2018 og 2019, 2022, 2023, 2024 og 2025 men ikki í 2020 og 2021. Grundgevingin var, at vit ikki høvdu nóg høgar lønarútreiðslur. Tað hevði við sær, at hetta lesarabrævið fór út - https://dimma.fo/grein/midlastudulsnevndin-drepur-teir-smau-midlarnar

Vit halda tað vera skeivt, at vit ikki fingu miðlastuðul tá, og vit uppskotinum í §4 stk 2 er ivamál um vit og aðrir miðlar kunnu fáa miðlastuðul. Tí spurningurin er hvussu nógv "eitt heilt lønt redaktionelt ársverk" er. JN.fo hevur um 20.000 til 25.000 brúkarar um vikuna, vit leggja tíðindir út hvønn dag í árinum, men tað sæst ikki aftur í lønarútreiðslunum, tí inntøkurnar svíðkja. Vit gjalda ikki meira út í lønarútreiðlsum enn hvat vit hava ráð til. T.v.s. at tað liggur nógv ólønt arbeiði aftanfyri JN.fo.

Kappingin um lýsingar er hørð, og dumpa summir miðlar prísin fyri at fáa lýsingarnar fyri at fáa endarnar at hanga saman, men at dumpa prísirnar ger støðuna bara verri fyri alla vinnuna. Tí er tað gott um miðlastuðulin allur verður goldin sum rakstrarstuðul.

Við at geva allan miðlastuðulin sum rakstrarstuðul ger eisini arbeiði hjá miðlastuðulsnevndini nemmari, so skulu tey ikki stýra hvussu miðlarnir arbeiða.

Íverksetarastuðul: Vit halda at tað er skeivt at hava íverksetarastuðul inni. Gev heldur teimum miðlunum ið í dag eru betri sømdir, og allan miðlastuðulin. Tað eru fleiri miðlar ið ikki fáa stórvegis í rakstrarstuðli í dag, og kann tað bara gera støðuna verri hjá teimum minnu miðlunum við at seta íverksatarastuðul inn.

Verkætlarnarstuðul: Vit halda er rætt er at avtaka tað sum vit kenna sum verkætlarnarstuðul.

Vegna JN.fo

Jóanis Nielsen, redaktør og Jóanis Albert Nielsen